Tunnil ímillum Øravík og Hov:

# Neyðugt við fleiri kanningum

**– Tað ber væl til at gera tunnilin ímillum Øravík og Hov niðri í dalinum í Hovi, soleiðis, sum suðuroyingar hava kravt, sigur norski serfrøðingurin, sum hevur kannað boriroyndirnar, sum vórðu gjørdar í summar. Men tað er neyðugt at gera fleiri kanningar**

HOVSTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað ber væl til at gera tunnilin ímillum Øravík og Hov niðri i dalinum í Hovi, soleiðis, sum suðuroyingar hava kravt.

Tað er niðurstøðan hjá norska, serkøna felagnum, Statkraft Grøner A/S.

Norska felagið hevur nú kannað boriroyndirnar, sum vórðu gjørdar í summar og í farnu viku varð niðurstøðan hjá felagnum handað Landsverkfrøðinginum.

Landsverkfrøðingurin hevur somuleiðis handað landsstýrismanninum í vinnumálum frágreiðingina.

Men Landsverkfrøðingurin sigur samstundis, at hóast hesar kanningarnar eru gjørdar, ber ikki enn til at gera eitt tilmæli um, hvar tað er best at leggja tunnilin.

– Fyri at kunna gera eitt tilmæli um, hvar tunnilin skal vera, er tað neyðugt við enn fleiri kanningum, tí enn eru umisk viðurskifti, sum eru ógreið, sigur Oyvindur Brimnes.




*Hendan eftirgjørda myndin vísir áleið, hvussu norska felagið, NCC, hevði hugsað sær, at ein tunnil niðri í dalinum fór at taka seg upp. Sum tað sæst, verður koyrt beint av av landsvegnum úr Porkeri, inn í tunnilin. Hetta er ein tunnil, sum tað ber væl til at gera, sigur norska felagið Statkraft Grøner, sum hevur kannað boriroyndirnar, sum vórðu gjørdar í summar*

## Fýra ymsir møguleikar

Niðurstøðan hjá Statkraft Grøner er, at tað ber væl til at gera tunnilin niðri í dalinum.

– Men tað krevur at hugsa seg væl um, áðrenn tað verður gjørt av, akkurát, hvussu tunnilin skal borast, tí tunnilin kemur at ganga ígjøgnum tilfar, sum er ógvuliga ymiskt. Summastaðni er fjallið sera gott og aðrastaðni ógvuliga vánaligt. Og ein máti at sleppa undan trupulleikum, er at leggja tunnilin soleiðis, at teinurin ígjøgnum tað vánaliga tilfarið verður so stuttur sum gjørligt.

Men tað kann so aftur føra við sær, at tunnilin fer ikki at ganga í beinari linju.

Samstundis verður tað neyðugt at gera meiri enn vanligt hevur verið í Føroyum burturúr at tryggja tunnilin og í ávísum støðum kann væntast, at tað fer at krevja heilt nógv av arbeiði fyri at tryggja tunnilin.

Serliga øravíkarmegin er eitt strekki upp á 500-600 metrar, har umstøðurnar eru sera truplar, sigur norska felagið.

Statkraft Grøner vísir á fýra ymsar linjuføringar har tunnilin kann borast niðri í dalinum. Í hesum fýra linjuføringunum, verður tunnilin lagdur upp á ymsar mátar, alt eftir hvussu long strekki, tunnilin kemur at gangas ígjøgnum tað vánaliga tilfarið.

Í tveimum av hesum linjuføringunum kemur tunnilin at liggja soleiðis, vatnið, sumsetir úr fjallinum, má pumpast út.

Men annars eru allir hesir fýra tunlarnir at kalla líka langir.

Oyvindur Brimnes, at rakstrarútreiðslurnar av at pumpa vatnið út mugu tískil eisini takast við í endaligu metingina, tí í hesum sambandi verður talan um eina varandi og støðuga útreiðslu.

## Kostar 135 milliónir

Statkraft Grøner metir, at tunnilin niðri í dalinum kann gerast fyri einar 135 milliónir krónur. Av teimum skulu so einar 30 milliónir brúkast upp á at tryggja tunnilin og til at leggja upp fyri óvæntaðum trupulleikum, sum jarðfrøðiligu viðurskiftini kunnu elva til.

Hesin tunnilin er einar 2500-2600 metrar og tað er 400-500 metrar longri enn tunnilin, sum Landsverkfrøðingurin mælti til í síni tíð og sum liggur nakað hægri í fjøllunum.

Upprunaligi tunnilin hjá Landsverkfrøðinginum varð mettur at kosta 94 milliónir. Men harafturat skuldu so vegir gerast fyri einar 35 milliónir, so tilsamans varð tunnilin, sum Landsverkfrøðingurin mælti til at gera, mettur at kosta 129 milliónir, ella seks milliónir minni enn tunnilin niðri í dalinum er mettur at kosta.

Landsverkfrøðingurin heldur, at fyri at samanbera báðar møguleikarnar, er tað rættast at taka tað við, sum vegurin fer at kosta.

Men av tí, at tað er so lítil munur á prísinum, heldur Statkraft Grøner, at tað er neyðugt at gera meiri nágreiniligar samanberingar av báðum tunlunum, tvs tunlinum, sum Landsverkfrøðingurin skeyt upp í síni tíð og tunlinum niðri í dalinum.

Kortini sigur Landsverkfrøðingurin, at ymsir ógreið viðurskfti eru, sum gera, at tað ikki ber til at samanbera prísirnir rættiliga, fyrrenn nágreiniligari kanningar eru gjørdar.

Eitt nú hevur norska felagið mett, at vegirnir fara at kosta 10.000-15.000 krónur fyri meturin og tað heldur Oyvindur Brimnes er sera dýrt, tá ið havt verður í huga, at alt tilfarið er ókeypis.

## Fleiri kanningar

Samanumtikið metir Statkraft Grøner, at enn er grundarlagið ov veikt til at gera eina endaliga niðurstøðu.

Tó mælir felagið til at fleiri kanningar verða gjørdar, eitt nú grunnar boringar øravíkarmegin.

Harumframt verður eisini mælt til, at summi av holunum, sum vórðu borað í summar, verða borað eitt sindur djúpari.

Statkraft Grøner heldur eisini, at tað hevði verið ein góð íløga fyri Landsverkfrøðingin at gjørt eina vágalýsing av projektinum fyri at fáa staðfest, hvørjar avleiðingar ymsar støður, sum kunnu taka seg upp, fara at føra við sær. Ein støða, sum kann hugsast at taka seg upp, er at tað verður neyðugt at tryggja partar av tunlinum enn meiri enn metingarnar vísa.

Sostatt biðjur Landsverkfrøðingurin nú Vinnumálaráðið um loyvi til at gera tær framhaldandi kanningarnar, sum skulu til, fyri at fáa eina heilt neyva lýsing av øllum viðurskiftum og fyri at kann, hvar ein tunnil niðri í dalinum, liggur best fyri.

Oyvindur Brimnes sigur, at tá ið tær nýggju kanningarnar eru gjørdar og ein vágalýsingin er gjørd, fer hann at gera eina Cost benefit greining, tað er eina eina offur - gagn greining av teimum ymsu møguleikunum, tvs, av tunlinum niðri í dalinum, av tunlinum, sum hann skeyt upp í síni tíð longri uppi í fjallinum og eisini av at varðveita vegasambandið sum tað er og slett ongan tunnil at gera.

– So hava politikararnar eina fullfíggjaða heildarmynd av viðursfkiftunum at taka støðu eftir, sigur Oyvindur Brimnes.



*Hendan eftirgjørda myndin vísir, teir báðar møguleikarnir, sum hava verið frammi. Upprunaliga skeyt Landsverkfrøðingurin upp at gera tunnilin høgrumegin, sum liggur nakað uppi í fjallinum. Uppskotið hjá NCC liggur væl betri fyri, heilt niðri í dalinum. Hóast kanningar eru gjørdar í summar, verður neyðugt við enn fleiri kanningum, áðrenn eitt tilmælið kann gerast, sigur norska, serkøna felagið, Statkraft Grøner. Landsverkfrøðingurin mælir til, at hesar kanningarnar verða gjørdar*



# Púra opið í Vágum mikudagin

**Mikudagin 10. desember er eitt ár liðið, síðan Vágatunnilin lat upp. Í hesum sambandi hava handlarnir í Vágum opið til seint á kvøldi, og Vágatunnilin letur allar bilar koyra ókeypis hendan dagin**

HÁTÍÐARHALD
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

**Vágar:**
Vágatunnilin fyllir eitt ár mikudagin. Í tí sambandi hevur leiðslan fyri Vágatunnilin gjørt av, at tað skal vera ókeypis at koyra gjøgnum tunnilin allan sólarringin.

Allar teir 24 tímarnar, skrivað verður 10. descember 2003, verður tað ókeypis at koyra gjøgnum Vágatunnilin. Bilar, sum hava kubba, skulu kortini koyra gjøgnum geilina, teir vanliga brúka, tó uttan at nakað verður kravt fyri tað. Aðrir bilar koyra hinumegin, men taka onga kvittan, sigur leiðslan fyri Vágatunnilin.

Í Vágum verður tað eisini hátíðarhildið, at eitt ár er liðið, síðan oyggin fekk fast samband við meginøkið og gjørdist ein partur av hesum.

Handlarnir í Vágum hava mikudagin opið til klokkan 23.00 á kvøldi, sigur Terji Nielsen, leiðari á Kunningarstovuni í Vágum.

Hann sigur, at tað er ein góður møguleiki hjá fólki at fáa avgreitt nakrar jólagávur ein gerandisdag, tá fólk annars hava nokk at gera og kanska ikki hava frí, fyrr enn handlarnir vanliga lata aftur.

Tað ber til at keypa allar jólagávur í Vágum, vísir Terji Nielsen á. Alt frá osti til borimaskinur fæst í teimum umleið 20 ymisku handlunum í oynni. Og stutt er at koyra ímillum bygdirnar.

Ongum nýtist at ganga svangur hendan dagin, hóast ein ikki hevur beinleiðis innivist ella kennir nakran at støkka inn á gólvið hjá at fáa ein bita. Tí syrgir Hotel Vágar fyri.

Hotellið fer hendan dagin at gera okkurt serligt burtur úr matskránni, greiðir kunningarleiðarin frá. Eina tunnilsbuffét, ella hvusus tað nú verður nevnt, fer hotellið at bjóða fólki, sum koma framvið.

Kunningarstovan í Vágum gav í farnu viku tað fyrsta eintakið av Vágatíðindum út. Talan er um kunningarblað, sum lýsir tiltøk, sum henda í Vágum hendan mánan. Eitt A4 ark, sum prentað er á báðum síðum og lagt saman. Minnir til sammetingar nakað um Havnartíðindi, ið fleiri kenna, sigur Terji Nielsen, kunningarleiðari í Vágum.

Seinnu árini hevur jólaskipið verður árligur gestur á Sørvági. Og eftir ætlan verður tað eisini soleiðis í ár. Vága Ríðingafelag hevur boðsent jólaskipinum art koma til Sørvágs tann 20. december. Og jólamenninir hava játtað at koma.

Tá jólaskipið er komið til Sørvágs, verða skip og manning heilsað við fýrverkarii. Síðan verður farið í fimleikarhøllina, har øll børn úr oynni, sum møtt eru upp, fáa jólapakkar, og tey vaksnu fáa ein kaffimunn.



*Sørvágur tekur í móti jólaskipinum tann 20. desember. Sørvingar hava sponsorerað alt tiltakið, sum tað er*

# Gamla Norrøna farin úr Esbjerg

**Eina tveir mánar ella so hevur gamla Norrøna ligið í Keypmannahavn. Skipið er ikki selt enn, men nú verður aftur tingast við áhugaðar keyparar**

SKIPASØLA
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Smyril Line roynir enn einaferð at selja gomlu Norrønu. Fyri fjørðu ferð eru nú samráðingar við áhugaðar keyparar, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line.

Tríggjar ferðir hava áhugaðir keyparar hugt at skipinum, men ongantíð er nøkur avtala gjørd. Nú verður samráðst við áhugaðar keyparar, sum ættaðir eru uttan fyri Europa, sigur Óli Hammer. Hini fyrru hava allir verið úr Europa, sigur hann.

Grundirnar til, at teir ikki hava selt skipið, eru ymiskar, sigur stjórin. Onkuntíð hava verið ov fáir pengar, tá til stykkis kom. Og onkur annar hevur fingið annað, betri tilboð, sum teir so heldur hava tikið av.

Hesaferð vónar hann tó, at eitt úrslit spyrst burturúr. Helst fyri jól. Hvør prísurin kann væntast at vera, vil Óli Hammer einki siga um.

Um gongdina hjá nýggju Norrønu sigur Óli Hammer, at Danmarakarrutan er í lagi. Men Noregsrutan hevur ikki gingið nóg væl, og tí er avgjørt at broyta rutuna, soleiðis, at siglt eisini verður til Íslands alt árið.

Nakað av fólki ferðast við Norrønu hesa tíðina. Nøkur fara til Hetlands og nøkur til Danmarkar. Um jólini verður væl av fólki við. Men serliga trongt verður tó ikki umborð vanligu túrarnar um veturin, heldur stjórin.




*Gamla Norrøna er nú farin úr Esbjerg og liggur í Keypmannahavn og bíðar eftir at verða seld*